# Minningarorð um pápa mín
# Hjalmar E. Guttesen

**f. 6. mai 1948 d. 26. mars 2003**



Eg trúði tí ikki, tá ið eg hoyrdi, at pápi mín var funnin drukn-aður, hann, sum var so góður svimjari. Eg helt, at tað kundi ikki passa, men so komu beiggjarnir Eiler og Jón, tá gekk upp fyri mær, at tað mátti vera satt.

Góði babba, eg minnist, tá ið vit vóru børn, tá tók tú okkum við tær til Klaksvíkar, har tú lærdi okkum at svimja. Tú hevði so gott tol og dugdi tú eisini so væl at læra frá tær, tú gavst ikki, fyrrenn vit øll dugdu at svimja.

Góði babba, ongantíð gloymi eg, tá ið tú fast hvønn sunnumorgun kom og vakti meg, fyri at geva mær drekka uppá songina, og hvussu tú altíð gav tær tíð at spæla ymisk spøl við okkum. Tú kundi sita í fleiri tímar og ikki var tað altíð so lætt hjá tær, tí eg og Adelaid klandraðust so illa, men tú dugdi so væl at fáa okkum at halda uppat, tí tú var so tolin við børn og tað sást eisini, tá ið tú koyrdi lastbil og gravmaskinu. Tú var ongantíð einsamallur, tí tað sat altíð okkurt barn í hjá tær, meðan tú arbeiddi. Og minnist eg, at børn komu heim til okkum fyri at vita, um tey kundu sleppa við tær til arbeiðis.

Góði babba, eg minnist, tá tú kom til mín og segði, at tú hevði teknað meg til at taka tað stóra koyrikortið. Eg trúði ikki, at eg fór at klára tað, men eg fekk so góða hjálp frá tær og gloymi ikki, tá ið eg fór upp í koyring, tá koyrdi tú aftan á mær alla tíðina, tú var so spentur at vita, um eg fór at klára tað, og var tú so glaður, tá ið eg hevði koyrikortið í hondini, og eg var so glað, tí nú kundi eg koma at hjálpa tær.

Góði babba, ikki hevur tað altíð verið lætt hjá tær, men tú var so tolin, altíð smílandi og ongantíð segði tú eitt øvugt orð um nakran, altíð hugsaði tú um onnur, soleiðis var tú bara.

Góði babba, tað tók hart uppá teg, tá ið Ægir fór á land, tú var so glaður fyri at vera við har og helt tú so nógv av Thorleifi, altíð spurdi tú meg, um eg hevði sæð hann.

Babba, at tú var væl avhildin, sást á tí stóra skara, sum kom at fylgja tær, og eitt skalt tú vita, babba, eg var ógvuliga slt av tær, tí øll, sum høvdu vit teg at gera, søgdu, at tú var tiltikin raskur maður, og vil eg takka tær fyri alt, sum tú hevur gjørt fyri meg. Tað er ógvuliga tungt at vita, at tú nú ikki er millum okkum meira, men góði babba, nú hvílir tú í friði, vit skulu nokk møtast aftur ein dag.

Ærað veri minnið um pápa mín, Hjalmar Guttesen.

**Dóttir tín Guðrun**

---

†

Kunngjørt verður, at kona, mamma, omma og vermamma okkara

**Astrid Maria Dalsgaard Hellisdal**
Tórshavn
ættað úr Skálavík

andaðist í heimunum sunnudagin 13. apríl, 50 ára gomul.

Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum mikudagin 16. apríl kl. 18.30 í Vesturkirkjuna. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni skírisdag kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Tom, Fróði og Brynhild**

Tey, ið vilja minnast Astrid við blómum ella kransi, kunnu ístaðin lata eina peningagávu til Neyðhjálp Fólkakirkjunar, konto í Føroya Banka.

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæri pápi, verfaðir, abbi, langabbi og vinur mín

**Robert Brockie**
vanliga nevndur Bobby
Tórshavn

andaðist sunnudagin 13. apríl, 76 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin 16. apríl kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Alan, Derek, Edna, Robbie, Ian og Frynhild**

---

# Postfundur í Kvívík

**Mánadagin var fundur í Glæmuni í Kvívik í sambandi við at posthúsið í Leynum og í Kvívík lótu aftur seinast fríggjadag. Tað var Soffi Egholm í Leynum, ið hevði kallað inn til fundin.**

FUNDUR
*Magnus Gunnarsson*



*Soffi Egholm í Leynum kallaði inn til fundin*

Eini hundrað fólk møttu til fundin, har umboð fyri Posverk Føroya eisini vóru við. Í Kvívíkar sókn búgva umleið 5-600 fólk. Tey eru sera misnøgd við at posthúsini eru niðurløgd, og við at tey skulu nýta posthúsið í Kollafirði í staðin. Í sóknini búgva nógv fólk sum ikki hava bil, serliga eldri fólk. Um tey skulu nýta bussrutuna, tekur tað teimum fýra tímar at koyra til Kollafjarðar at gera síni ørindir á posthúsinum. Eisini Sparikassin, sum heldur til í somu húsum sum posthúsið í Kvíkvík er næstan afturlatin, har er bert opið hósdag frá kl. 15-18. Tað sum fundarfólkið ynskti var at fáa posthúsið latið upp aftur ella at fáa eina landpostrutu, har fólkini í sóknini kunnu avgreiða síni postviðurskifti við postboðið. Eisini var eitt uppskot um at havt ein postbanka, har fólk kundu avgreitt síni post og bankaørindi á einum staði. Soffi Egholm sigur, at tað sum nú kemur at henda er tað at tey fara at savna inn undirskriftir, har tey krevja at posthúsið verður latið upp aftur, ella at tey fáa eina landpostrutu. Undirskriftirnar skulu handast løgmanni. Soffi Egholm sigur, at hon undrast á, at Postverk Føroya enn er bundið av einum sáttmála, ið teir arvaðu, tá postverkið var yvitikið í 1976. Hetta er ein knútur, sum bert politikkarnir kunnu loysa, tí Postverkið er bundið á hendur og føtur. Teir kunnu ikki gera annað enn at niðurleggja posthús o.l.sigur Soffi Egholm. Soffi er úr Leynum, hon hevur búð í Danmark í 28 ár. Hon hevur sitið í Viborg Amtsråd í 17 ár. Hon hevur eisini verið upstillað til fólkatingið. Soffi flutti heim aftur til Leynar í fjør.



*Bergur í Garði, postverkstjóri, og Roymer Lamhauge, deildarleiðari, vóru við á fundinum*

---







Tann 1. juni 1808 kom ein annar gestur á Havnina. Tað var barónurin Karl von Hompech (brillumaðurin) við skipi einum Salamine, ið var kaparaskip við bretskum loyvi. Tveir útróðrarmenn úr Vágum, sum teir høvdu tikið umborð, høvdu vist tí fremmanda skipinum leiðina til Havnina. Skipið hevði franskt flagg á stong (Danmark var í krígnum í parti við Fraklandi); men skjótt varð greitt, at von Hompech var í bretskari tænastu. Hann ætlaði sær til Noregs og hevði eingi onnur ørindi enn at fáa ein kønan mann við sær. Av royndum sjómonnum, skiparum, vóru í Føroyum um hetta mundi bert tveir. Annar var ein gamal danskur skipari, sum búði í Havn, Peter Hansen, kallaður Skiparin Hansen, og Nólsoyar-Páll, sum búði norður í Vági.
Navnið "Brillumaðurin" hevði Karl von Hompech fingið, tí hann hevði brillur, sum var óvanligt tá á døgum.

NIELS L. ARGE
Kongabrúgvin - Tórshavn - Tlf. 31 17 31